ÍTRÓTTARBLAÐIÐ
Sosialurin 31. mars 2010



Neistin hevur vunnið fýra av fimm dystum ímóti Kyndli í vetur, teirra millum steypafinaluna, og má tí roknast sum favorittur at vinna føroyameistaraheitið
Mynd: Álvur Haraldsen

# Finalur millum grannar

**Neistin má metast sum stórfavorittur í FM-finalunum ímóti Kyndli, tí Neistin hevur í ár vunnið fýra av fimm dystum millum liðini. Men í finalum er dagsformurin avgerandi, og Kyndil er kanska til reiðar at spæla sum ongantíð fyrr**



einslistir@kallnet.fo
Hilmar Jan Hansen

Líka so lítil spenningurin hevur verið um fremsta plássið í Atlantic Airways-kappingini, líka so stórur var hann um, hvat lið skuldi í finaluna ímóti Neistanum, sum í allan vetur hevur verið í einum klassa fyri seg. Tá avtornaði, var tað hitt havnarfelagið, Kyndil, ið streyk avstað við finaluplássinum, men avgerðin fall ikki fyrr enn í seinasta umfarinum.

At FM-finalurnar verða millum grannar, skuldi ikki gjørt tær minni áhugaverdar, tí slíkir dystir hava altíð ein innbygdan spenning í sær, samstundis sum alt kann henda í einari grannauppgerð – eins og alt kann henda í einari finalu.

Tær báðar fyrstu finalurnar verða spældar í ítróttarhøllini á Hálsi, fyrst skírisdag klokkan 17 og síðani páskaaftan klokkan 16, og hevur hvørki liðið tá fingið minst ein sigur og ein javnleik, verður ein triðja finala spæld annan páskadag í ítróttarhøllini í Kollafirði.

## Allir gleða seg

Ingi Olsen, sum er spælandi venjari hjá Neistanum, var sunnudagin fegin um, at mótstøðuliðið gjørdist Kyndil, tí tað er eitt lið, ið hóskar Neistanum sera væl.

– Vit hava vunnið steypafinaluna móti Kyndil seinastu tvey árini, og vit hava vunnið greitt á teimum í landskappingini í ár, so Kyndil er helst ynskimótstøðan, staðfesti hann sunnudagin.

Eisini David Edvardsen, toppskjútti hjá Neistanum og í landskappingini samanlagt, helt Kyndil vera eitt gott mótstøðulið at fáa.

– Vit hava spælt tríggjar sera tættar dystir móti VÍF, men vit hava havt gott tak á Kyndil, segði hann.

Í Kyndli kundu teir sunnudagin frøast um, at stórsigurin á StÍF gav gott sjálvsálit, samstundis sum liðið hjá teimum grønu fekk nógv at rigga, sum annars ikki hevur riggað so væl í vetur. Tað kundi bent á, at Kyndil er til reiðar at møta Neistanum í finalunum, og strikuspælarin, Janus Einar Sørensen, segði sunnudagin, at hann gleddi seg til dystirnar.

– Vit fara í øllum førum út á vøllin fyri at vinna hasar finalurnar, staðfesti hann, tá tað var greitt, at Kyndil hevði vunnið hørðu kappingina um finaluplássið.

# 100.000 krónur fyri FM

**Annað árið á rað letur Rainbow Seafood 100.000 krónur til FM-vinnaran í manshondbólti. Treytin er, at peningurin verður nýttur til Europa-Cup**

Orsøkin til, at P/F Rainbow Seafood letur stuðulin, er at eigararnir hava stóran áhuga fyri hondbólti og hava eitt ynski um at menna hann. Vónin er, at stuðulin gevur FM-vinnarunum ein møguleika og kanska eitt skump til taka lut í altjóða hondbólti, sum er ein fortreyt, skal føroyskur hondbóltur koma upp á hægri stig.

Undirstrikað verður, at liðið, sum fær stuðulin, skal í mestan mun nýta føroyskar spælarar í altjóða luttøkuni, og tí er treytin, at føroysku serreglurnar um, at í mesta lagi tríggir útlendingar eru á liðnum, eru galdandi. Tað er bara føroyameistaraliðið í manshondbólti, sum fær stuðulin.

-mørk

# Finaludómarar settir

Hondbóltssambandið hevur ásett, hvørjir dómarar skulu døma FM-finalurnar í manshondbólti, sum verða spældar næstu dagarnar millum Neistan og Kyndil.

Fyrstu finaluna skírsdag klokkan 17 døma Rúni Mohr og Ragnar Simonsen, og aðru finaluna páskaftan klokkan 16 døma Eyðun Samuelsen og Andreas F. Hansen. Hesir báðir dystirnir verða spældir í ítróttarhøllini á Hálsi í Havn.

Er eingin avgerð fallin um føroyameistaraheitið, verður neyðugt við einari triðju finalu, sum skal spælast í ítróttarhøllini í Kollafirði annan páskadag, og tá verða Eyðun og Andreas aftur dómarar.

hil

# Blá og grøn upphiting

Bæði Neista- og Kyndils-fólk leggja nógv fyri, nú manslið teirra skulu spæla FM-finalurnar, sum gera av, hvør verður føroyameistari í manshondbólti. Og undan fyrstu finaluni, sum verður í morgin, verður bæði blá og grøn upphiting.

Neistafólkini hittast í Neistarúminum í morgin klokkan 15, har hitað verður upp við andlitsmáling, sangi og góðum stemningi, og ætlanin hjá fyrireikarunum er, at øll skulu verða í bláum.

Hálvan tíma seinni, klokkan 15.30, møta Kyndilsfólkini í Bowlinghøllini, har andlitsmáling eisini er á skránni, umframt at hitað verður upp við Kyndilstónleiki.

Hóast tað fyrst og fremst er á hondbóltsvøllinum, dysturin verður spældur og vunnin, er hugaligt at síggja, at áskoðararnir eisini fara at gera sítt til, at talan verður um ein minst líka góðan dyst uttan fyri strikurnar.

hil